# Britt og Esther fegnast um ungdómshús



*Britt og Esther vóna, at ungdómshúsið skjótt verður veruleiki, tí stórur tørvur er á tí*

*Mynd: Anna P. Mortensen*

UNGDÓMUR

Tey ungu á Tvøroi hittast á Statoilstøðini. Ikki tí, at tey eru so fegin um tað, men heldur av neyð, tí einki veruligt stað til tey ungu er á Tvøroyri.

Hetta varð umrøtt í grein í blaðnum í gjár. Men í sambandi við greinina í gjár vantaði ein mynd. Tað var myndin av teimum báðum, Britt og Esther, sum ganga í 9. flokki í Tvøroyrar skúla.

Tær søgdu m. a., at tær kunnu ikki lata vera við at koma á Statoilstøðina, tí á Tvøroyri er onga aðrastaðni at fara, og tí hittast tær – saman við øðrum ungdómi á Tvøroyri, á Statoilstøðini.

Tær halda tað vera eitt frálíkt hugskot, um ein ungdómsklubbur varð stovnaður, so sum greitt varð frá í blaðnum fríggjadagin.

Og tær eru samdar um, at fara nakrir bleytir stólar at finnast har ella ein sofa, ja, so hevði tað bara verið fantastiskt. Og tað má sigast, at krøvini ikki eru so øgiliga høg...


# Politistur

### Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet - ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðing fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

### Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum.
Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum - um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí.
Atlitið til borgaran og samfelagið er alla tíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar

### Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum.
Royndartíðin er umleið 3 ár. Aftaná tað fært tú - um tú ert egnaður til politiarbeiði - fast starv sum politistur.

### Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politið hevur eina røð av serskeiðum - og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



### Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði - og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

**Føroya Landfúti**
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Postsmoga 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 1448 fax. 35 1449
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 3 politistar skulu setast heystið 2004.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 15.03.2004


Mikkjal kemur aftur til Havnar:

# Rimmar rokkkvøld við Speaker, 48 pages og SIC




ROKKKVØLD

*Tíðindaskriv*

Stór var frøin, tá tað frættist, at ein av okkara allarbestu rokksangarum, sum vit annars hildu okkum at hava mist til Eysturoynna, Mikkjal Gaard Hansen, maðurin, sum fekk Krit at flúgva og okkum onnur at flippa út við kultbólkinum Sic, aftur vildi koma at spæla í høvuðstaðnum.

Mikkjal, sum er føddur og uppvaksin (tónlistarliga) á Margarinfabrikkini, kemur nú heim aftur og ætlar hann saman við nýggja rokkbólki sínum SIC at lata løgini tóna í nýmálaðu rokkstovuni á Margarinfabrikkini.

Tveir aðrir bólkar eru eisini fúsir at spíla seg út og geva rokkinum eitt spark. Teir eru 48 Pages (fyrrverandi Monkey Mongolia) við broyttari manning og einum nýggjum stíli, sum vil nakað og Speaker, ið hevur lagt seg trygt á ein stíl, sum alt fleiri halda sera nógv um.

Alt í alt verður lagt upp til eitt feitt rokkkvøld, har streymurin verður settur á ungdómin, og væntandi koma nógv fólk til hetta sera spennandi tiltak.

Konsertin verður á Margarinfabrikkini fríggjakvøldið kl 22.



# Umvælingarnar á Norrønu ganga væl

**– Umvælingarnar á Norrønu á skipasmiðju í Hamburg ganga væl, og tíðarætlanin 20. mars tykist halda, tá Norrøna aftur skal í sigling. Metalskaðin á skipinum er ornaður, og nú verður bíðað eftir nýggjum skrúvum, sigur Kári Durhuus, fjølmiðlaráðgevi á Smyril Line. Hann hevur seinastu tíðina marknaðarført norðuratlantiska ferðavinnu á tíðindafundum og ráðstevnum í Týsklandi og Onglandi, og hóast skaðan hjá Norrønu á Havnarvág herfyri er áhugin sambært Kára Durhuus bert vaksandi uttanlanda**



*– Hóast skaðan hjá Norrønu tykist áhugin fyri norðuratlantisku ferðavinnuni og Norrønu bert vera vaksandi, sigur Kári Durhuus, fjølmiðlaráðgevi hjá Smyril Line, sum letur væl at umvælingunum á Norrønu í Týsklandi*

FERÐAVINNA

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Eftir óhepna skaðan á Havnarvág verður flaggskipið í norðuratlantisku ferðavinnuni sum kunnugt umvælt á kendari skipasmiðju í Hamburg í hesum døgum. Fjølmiðlaráðgevin hjá Smyril Line, Kári Durhuus, letur væl at gongdini, har metalskaðin á Norrønu er ornaður, meðan tað framvegis verður bíðað eftir nýggjum skrúvum.

– Sum upprunaliga ætlað leggur Norrøna helst frá landi úr Hanstholm 20. mars, eftir at hon hevur verið ígjøgnum eitt garantieftirlit, so tíðarætlanin skuldi hildið, um einki óvæntað hendir, vísir Kári Durhuus á, sum við tíðindafundum og ráðstevnum marknaðarførir norðuratlantisku ferðavinnuna uttanlanda.

### Vaksandi áhugi

Sæð burtur frá sjálvum skaðanum á Norrønu, sum kostar Smyril Line 1,5 milliónir í sjálvsábyrgd, er tað sambært Kára Durhuus ov tíðliga at meta um avleiðingarnar av óhappinum í samlaðu føroysku ferðavinnuni. Men rákið tykist vera positivt við einum vaksandi áhuga frá tíðindafólki uttanlanda, sum viðgerða ferðavinnu.

– Á teimum ráðstevnum og tíðindafundum, vit hava havt í Onglandi og Týsklandi, er áhugin sera stórur fyri spildurnýggja ferðamannaskipinum og ferðavinnu sum heild um okkara leiðir, har skaðin hjá Norrønu ikki tykist hava oyðilagt umdømið, sigur Kári Durhuus.

Talið av tíðindafólkið á tíðindafundum hjá Smyril Line uttanlanda er sambært Kára Durhuus tvífaldað, og fyri stuttum møttu 20-30 journalistar í München upp at hoyra um møguleikarnar at ferðast um okkara leiðir. Kári Durhuus undirstrikar, at 20-30 tíðindamenn er eitt sera høgt tal í hesum høpi.

### Framvegis leggja at í Havn

Líka síðani Norrøna kom til Føroya hevur áhaldandi kjak verið um, hvar Norrøna skal leggja at, og røddir hava verið frammi um, at Havnin ikki er egnað. Men sambært fíggjarstjóranum á Smyril Line, Jóannes á Váli, verða ongar broytingar gjørdar hesum viðvíkjandi.

– Norrøna fer framvegis at leggja at í Havn, og hóast talan er um eitt áhaldandi kjak, hava vit ongar ætlanir um at broyta hetta, sigur Jóannes á Váli.

Viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum hjá Smyril Line hevur annars ljóðað, at talan av ymsum orsøkum ikki gjørdist um eitt gott ár í fjør, men hetta hevur fíggjarstjórin ongar viðmerkingar til.

– Roknskapurin er ikki endaliga uppgjørdur, og annars avdúka vit vanliga ikki upplýsingar um hetta undan aðalfundinum í næstum, sum tó ikki er fastlagdur enn, sigur Jóannes á Váli at enda.



*Í løtuni verður bíðað eftir nýggjum skrúvum til Norrøna, eftir at tær gomlu fóru so illa í óhappinum á Havnarvág*



*Metalskaðin hjá Norrønu er júst ornaður á skipasmiðju í Hamburg, og ætlanin um comeback 20. mars tykist halda*